

*Hafsteinn Jóhannsson hevur givið bát sín Elding til eitt bygdasavn í Akranesi. Havnin var seinasti steðgurin á ferðini yvir til Íslands. Seinastu 13 árini hava Hafsteinn og Elding siglt 63.000 sjómíl, sum er tríggjar ferðir kring jørðina*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Tríggjar ferðir kring jørðina

**Uppá 13 ár hevur Hafsteinn Jóhannsson siglt 63.000 sjómíl. Tað svarar til tríggjar ferðir kring jørðina. Skip hansara, Elding, og hann eru nú á veg til Íslands. Hetta er seinasta ferðin hann ger við Elding, tí nú letur hann skipið til bygdasavnið á Akranesi**

SJÓFARARI
*Ingrid Bjarnastein*

**Vágsbotnur:** Niðri í Vágsbotni í Havn liggur ein stásislig skúta. Sermerkt á egnan hátt við eini rúgvu av lýsingum eftir síðuni á bátinum, og eitt Bónus flagg hongur á flaggstongini. Á síðuni síggjast eisini nøkur slitin fløgg, og tað føroyska er eisini at hóma har ímillum.

Sólin bakar niður í Vágsbotni, og uttanfyri Café Carlsborg situr ein rúgva av fólki og hugnar sær í góðveðrinum.

Umborð á Elding liggur ein maður í tretivu árunum. Hann bjóðar vælkomin og spyr um vit eru blaðfólk. Eftir at hava fingið eitt játtandi svar, ringir hann eftir skiparanum, og bjóðar síðani kaffi.

Hann er norðmaður, og sonurin Eskild spælir á dekkinum. Hann hevur ein glúp og eina coca cola dós, og hann hugnar sær ófrøt nú fremmandafólk eru komin umborð.

## Long ferð

Eitt korter seinni kemur ein sólbrendur, eldri maður við brillum umborð á bátin. Hann er í fylgi við einum øðrum í hvítari t-troyggju og sólbrillum. Vit fáa at vita, at hetta er eigarin og skiparin á Elding, Hafsteinn Jóhannsson.

Hann er fyrikomandi og fryntligur og bjóðar vælkomin.

– Hetta er onnur ferðin eg eri í Føroyum. Eg var her fyri tveimum árum síðani í samband við Vínland 2000, tá vit vóru á veg yvir til Grønlands, greiðir Hafsteinn frá.

Hafsteinn er íslendingur, men hevur búð í Noregi í fleiri ár, har hann hevur arbeitt og sjálvur bygt Elding.

– Eg búgvi í Noregi, men eg havi ikki verið har í tvey ár. Nú koma vit úr Noregi, men vit vóru har bara í 14 dagar áðrenn vit sigldu víðari.

Skiparin er 68 ára gamal, og hevur so at siga alt sítt lív havt sigling sum áhugamál. Elding bygdi hann fyri 13 árum síðani, og hesi árini hevur hann siglt tilsamans 63.000 sjómíl. So nógvar sjómíl er tað sama, sum at sigla tríggjar ferðir kring jørðina.

– Nú eru vit á veg yvir til Íslands. Eg skal sigla bátin til bygdasavnið á Akranesi. Eg gav teimum bátin í 1993, og so havi eg lænt hann síðani tá. So tað verður sum at koyra konuna á savn, sigur hann og flennir.

## Bjarging

Tá farið varð úr Noregi var meiningin at ein minni bátur skuldi fylgja Elding til Hetlands, og síðani verða tikin uppí. Báturin er lítil, og á veg yvir til Hetlands mistu teir umboð sambandi við bátin, og meldaðu hann saknaðan.

Ein supplybátur fann minna bátin og ein bjargingartyrla kom og setti hann av á einum boriplatform. Síðani sigldi Elding til boriplatformin og fekk hann umborð. Ein bummur varð brúktur og tann yngri norðmaðurin veipar og vísir við ørmunum, hvussu gjørt varð fyri at fáa bátin umborð.

– Ein má kunna lívbjarga sær sjálvum, sigur Hafsteinn róliga, meðan hann tekur brillurnar av.

Valdimar, sum sigldi tann minna bátin, sær ikki út til at hava tikið nakran skaða, sjálvt um hann lá í 24 tímar í lítla bátinum uttan mat og vatn.

## Liðugt

Í dag, leygardag, var ætlanin, at Elding skuldi sigla víðari til Íslands. Fyrst Vestmannaoyggjarnar, og so skal báturin til Akranes, har hann skal handast savninum.

– Tað eru trý ár síðani, at eg eri givin við at arbeiða. Eg arbeiddi á einum ídnaðarvirki í Husnæs í Noregi, so sigling hevur altíð bara verið eitt frítíðarítriv. Men nú rokni eg við, at tað er liðugt við tí. Eg veit ikki, hvussu leingi eg verði í Íslandi, men eg fari so yviraftur til Noregs, greiðir Hafsteinn frá.

– At gevast at sigla er púra náttúrligt fyri meg. Fyrr ella seinni má ein gevast, sigur hann.

Fýra dagar av sigling liggja frammanfyri stavn nú Elding. Nú verður stevnt ímóti Íslandi, og Hafsteinn sleppur aftur at síggja heimlandi eftir mong ár, sum útiseti.



Eyðgunn Samuelsen:

# Dagrøkt er eitt javnbjóðis tilboð

**– Vit hava nógv foreldur her í Klaksvík, sum eru glað fyri og vælnøgd við teirra dagrøktarmammu, sigur Eyðgunn Samuelsen, sum er sera bilsin av at hoyra borgarstjóran í Havn siga, at flestu foreldur í Havn heldur ynskja stovnspláss til teirra børn**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*

Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd í Klaksvíkar býráð, heldur so avgjørt, at eitt dagrøktarpláss er eitt javnbjóðis tilboð við stovnspláss. Hon vísir á dygdir, sum fáast í dagrøkt, sum ikki kunnu fáast á einum stovni.

– Har er trygt, og tað er tann eini og sami persónurin, sum er um børnini hvønn dag. Og tað eru bert fýra børn, og tað ger, at dagrøktarmamman hevur góða tíð til øll børnini. Og hartil eru børnini í einum heimligum umhvørvi allan dagin, meðan foreldrini eru til arbeiðis, sigur hon. Eisini lærir barnið nakrar heimligar rutinur, og tey gerast ein partur av tí familjuni, meðan tey eru har í dagrøkt.

– Í Klaksvík hava vit gjørt nógv við dagrøktina og at syrgja fyri, at hon er so góð sum møguligt. Eisini er eftirlit og tær fáa stuðul til at gera teirra arbeiðið og ráðgeving, um tað er neyðugt, greiðir hon frá.

Eyðgunn heldur eisini, at nú tað er so stórur tørvur á námsfrøðingum, at ein uppskúling av dagrøktarum hevði verið eitt gott hugskot.

– Lærarskúlin tekur bert ein námsfrøðinga-flokk inn um árið, og tað nøktar als ikki tann stóra tørvin sum er. So hvat við at havt eitt hvørt fyri dagrøktarunum. Nakað sum er til teirra og ikki til stovn, sigur Eyðgunn.

*Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd Klaksvíkar býráð, heldur at dagrøkt er ein javnbjóðis tænasta við vøggustovu í dag. Hon væntar, at bíðilistin til barnaansing í Klaksvík verður burtur um árslok*



Í Klaksvík er nærum ein triðingur av børnunum, sum eru í ansing, í dagrøkt, og Eyðgunn sigur, at flestu foreldrini eru sera vælnøgd.

– Vit halda, at tað er ein avbera góð tænasta, sum vit veita okkara borgarum, og tað er sanniliga ikki bara tí, at tað er bíligari, sum tað so ofta verður ført fram. Vit meta somuleiðis, at dagrøkt er góð fyri barnið, serliga tey fyrstu árini, sigur hon og vísir aftur til dygdirnar, sum hon tosaði um.

Tað finnast ongi tøl yvir, hvussu mong foreldur í Klaksvík eru nøgd ella hvussu vælnøgd tey eru, men Eyðgunn vísir á, at ein kanning er gjørd niðri, har níggju út av tíggju foreldrum siga seg vera avbera fegin um teirra dagrøktara. Ein danskur granskari hevur sagt í eini grein, at tað er ein vissur pedagogikkur innan dagrøktina, um ikki á sama hátt sum á stovni.

## Bíðilistin vekk við árslok

Sum er er bíðitíðin til at fáa eitt barn í ansing í Klaksvík umleið eitt ár, men arbeitt verður hart ímóti at fáa bíðilistan burtur.

Eyðgunn væntar, at listin verður burtur í seinasta lagi við árslok í ár, um alt gongur, sum tað gongur nú. Hon sigur, at tað verður arbeitt við ymsum uppskotum, sum hon tó ikki vil út við enn, men um hesi koma í gjøgnum, so verður tað bert tann lítli realistiski bíðilistin við árslok.

# Eldrahugni í bakandi sól

**Klokkan trý hósdagin, tá sólin stóð hægst á himni, bjóðaði Gera Arge teimum mongu eldru fólkunum, sum vórðu savnað úti í Grøv til hugnaløtu, hjartaliga vælkomnum. Veðrið var av tí allarfagrasta, og hitin mundi liggja væl oman fyri tey 20 stigini**

HUGNALØTA
*Solby A. Eliasen*



*Tað vóru nógv fólk savnað úti í Grøv hósdagin til eldrahugna. Ung sum gomul hugnaðu sær í góðveðrinum*

**Klaksvík:**
Frítíðarplássið úti í Grøv var fult av fólki seinnapartin hósdagin. Serliga tey yngstu og tey elstu vóru vælumboðað. Og tað var ikki so løgið, tí tá slíkt summarveður er, fara børn altíð út hagar at hugna sær. Og hósdagin skipaðu Eldrabólkurin í norðoyggjum, Dagtilhaldið og Hugni fyri eldrahugna. So í felag hugnaðu børn og pensjónistar sær í øllum hitanum hósdagin.

Klokkan var ikki farin langt av hálvgum trý, tá tey fyrstu sóust koma til hugnaløtuna. Stólar vóru settir upp allastaðni fram við Gravaránni og nógva staðni sóust onnur sita á teppum á bønum, sum helst ikki var heilt turrur, tí tað hevur regnað nógv ta seinastu tíðina. Nógv komu til gongu – bæði eftir gamla vegi og frá Oyravegnum. Tey, sum sótu í koyristóli, vórðu trillað út eftir gamla vegi. Gøtan oman til sjálvt plássið er sera brøtt, men tað stóð ikki á hjá teimum, ið trillaðu at fáa hjálp, so at øll sluppu heilt oman, har alt gekk fyri seg.

Felagssangur var og limir úr Klaksvíkar Hornorkestri spældu.

Síðani helt Anna Katrin Matras, fornfrøðingur, fyrilestur um toftirnar úti í Grøv. Og hon byrjaði sín fyrilestur ógvuliga passandi við at hugleiða um, tá hon sum barn plagdi at spæla úti í Grøv uttan at vita, at tað vóru toftir, sum hon spældi á. Anna Katrin greiddi eitt nú frá gamla Mylluhúsinum og neystatoftunum. Og hóast nógv børn spældu, meðan hon helt fyrilestur, so tyktist tað ikki at vera nakað trupulleiki at hoyra hana.

Tá fyrilesturin var av, var te, kaffi og køkur at fáa, og tað var ein lætti hjá teimum mongu, sum har vóru, at sólin hvarv eina løtu, tí hitin var nógvur.

Ein sera hugnalig løta úti í Grøv, sum tey eldru av sonnum fegnaðust um.

Hetta er fimta árið á rað, at skipað verður fyri eldrahugna úti í Grøv, og fyrireikararnir siga, at tað eydnast betur og betur fyri hvørt ár. Tey hava altíð verið heppin í veðrinum, men í ár má sigast, at hetta helst hevur verið tað besta nakrantíð. Tey skuldu upprunaliga hava hugnaløtuna týsdagin, men útsettu tað vegna veður. Og tað skuldi vísa seg at vera avbera skilagott.

*Anna Katrin Matras, fornfrøðingur, helt fyrilestur um toftirnar úti í Grøv. Onkur helt fyri við hana, at hon ikki mátti halda ein ov langan fyrilestur í øllum hitanum. Og tað gjørdi hon so heldur ikki*

